

*Set top boxin frá Televarpinum verður av summum kallað »frystiboks«. Men nú eru trupulleikin við »frystingini« loystur, sigur Tróndur Djurhuus – her avmyndaður í LM Handlinum í Havn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nú er »frystiboksin« avrímað…

**Televarpið hevur nú loyst trupulleikan við, at set top boksin frystir. Nýggjur ritbúnaður verður sendur haldarum**

Seinastu tíðina hava tey í Televarpinum havt úr at gera við at kanna nýggja ritbúnaðin (software), sum haldarar hjá Televarpinum fyrsta dagin fáa sendandi. Hesin ritbúnaður skal loysa trupulleikan, sum fleiri hava havt við tað at boksin »frystir«.

– Vit harmast um, at fólk hava havt hesar trupulleikar, sigur Tróndur Djurhuus, sum leggur dent á, at trupulleikin einki hevur at gera við hvørki netið ella boksina. Hann sigur, at ritbúnaðurin, sum er lagdur í boksirnar, ikki hevur verið tann rætti til endamálið. Fólk frá Force, sum ger boksirnar, hava nú tillagað ritbúnaðin, sum tey hjá Televarpinum seinastu dagarnar hava roynt av.

– Við hesum hava vit loyst trupulleikan við frystingini, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri á Televarpinum. Hann sigur, at haldarar hjá Televarpinum fáa ritbúnaðin sendandi gjøngum netið beinleiðis í boksina. Tey fáa so eina frágreiðing sendandi við postinum, har neyvt verður greitt frá, hvussu dagførdi ritbúnaðurin verður settur upp.

Televarpið er eitt hitt fyrsta, ið roynir hetta slagið av sjónvarpið. Tað serliga við Televarpinum er, at sjónvarpssignalið verður sent talgilt (digitalt) – og at fólk kunnu taka ímóti hesum við vanligum antennum. Vanligt sjónvarp verður sent analogt, og tað eru bara fylgisveinastøðir, ið senda digitalt sjónvarp, men tá nýtist tær at hava eina parabol, fyri at taka ímóti signalinum.

– Í grannalondum okkara er hetta eisini nakað heilt nýtt, sigur Tróndur Djurhuus, ið vísir á, at Televarpið gongur nýggjar leiðir, sum enn eru í síni byrjan.

Annað mál, ið Televarpið fær loyst ein av fyrstu døgunum, verður at fáa Sjónvarp Føroya upp á sendinetið. Sjónvarp Føroya sendir analogt, men fyri at Televarpið skal kunna senda sjónvarpið eisini, má signalið gerast digitalt. Hetta verður gjørt á sendistøðini uppi á Varða. Haldarar hjá Televarpinum gjalda einki eyka fyri Sjónvarp Føroya, men tey fáa fleiri fyrimunir, eitt nú nýtist teimum bara eina fjarstýring, og so verður myndagóðskan nógv betri og stabilar, tí digitalt sjónvarp órógvast ikki av øðrum, so sum analogt sjónvarp ger – myndin verður ikki dupul, og tú sært einki kavarok. Annaðhvørt sært tú myndina ella ikki…

Televarpið er enn ikki komið á mál við samráðingunum við Danmarks Radio um sendirættindini til DR1 og DR2. Tróndur Djurhuus sigur, at tey kundu ikki góðtaka prísin fyri hesi sendirættindini – at fólk í Føroyum skulu gjalda tað, ið svara til lisensin í Danmark. Hetta er tann avtalan, sum DR hevur gjørt við annan veitara, men Tróndur Djurhuus sigur, at tey eru bangin fyri, at tað fer at skapa fordømi, um Televarpið góðtekur tann prísin.

– Vit ganga sum nevnt ótroyttar leiðir, og hetta er eisini nakað nýtt í Danmark, at ein digital sendistøð sum okkara skal senda víðari donsku rásirnar. Samráðingarnar fara nú fram á øðrum løgfrøðisligum grundarlag, við tað at Televarpið ikki er ein fylgisveinasendistøð, og tí verður samráðst út frá, sigur Tróndur Djurhuus. Hann heldur tað hava týdning, at hetta grundarlagið verður brúkt, tí so kunnu vit vænta lægri prísir enn frá fylgisveinastøðunum, og tann avtalan, sum verður gjørd við Danmarks Radio, fer at verða fordømi fyri allar aðrar avtalur, sum verða gjørdar í danska kongaríkinum – men tað tekur tíð, og tí mugu vit smyrja okkum við, sigur Tróndur Djurhuus.

Umframt Danmarks Radio, so eru nógv fólk, ið hava vent sær til Televarpið við ynski um at síggja TV3, 3+ og Viasat Sport. Tí er Televarpið nú farið at samráðast við Viasat, og har sær út til, at gongd er komin á, sigur Tróndur Djurhuus.